*Eftirmeting av boringini í Lopra:*

# Væl nøgdir við føroysku arbeiðsmegina

JAN MÜLLER

Seinnapartin í gjár var fundur á Hotel Føroyum við umboðum fyri teir ymsu partarnar, sum vóru við í boringini í Lopra. Hetta var ein eftirmeting (evaluering) av allari verkætlanini, sum Føroya Oljuídnaður hevði boðið um fyri at vita, hvussu føroysk arbeiðsmegi, tænastufyritøkur o.a. stóðu seg í hesum fyrsta okkum nýggja arbeiði.

Á fundinum vóru umboð fyri nógvar av teimum fyritøkum, sum høvdu tilknýti til boriarbeiðið. Úr Danmark vóru umboð fyri bæði operatørin Danop og projektørin Dopas.

Í tíðindaskrivi eftir fundin verður sagt, at operatørurin Danop er fegin um at kunna staðfesta, at føroyski parturin av projektinum helst verður umleið 25%. Endaligi kostnaðurin fyri alt projektið gjørdist 44 mill. kr.

Víst verður á, at tað er at fegnast um, at føroyskar fyritøkur hava verið kappingarførar á øllum økjum.

Operatørurin veitti annars stóra tøkk til lokalsamfelagið í Suðuroynni, sum hevði tikið ómetaliga væl ímóti teimum mongu fremmandu, sum búðu har undir øllum arbeiðinum.

Danop sigur víðari, at teir hava verið nøgdir við arbeiðið, sum føroyingar hava latið úr hondum, men siga eisini, at tað er umráðandi at vísa á, at føroyingar mugu vera sinnaðir til at fara til arbeiðis uttan stórvegis ávaring, tí seinkingar kunnu vera sera kostnaðarmiklar í slíkum projektum.

Størsti trupulleikin hjá operatørinum undir boriarbeiðinum hevur verið at fáa eykalutir fram til boriplássið. Sum heild hevur flutningsorkan verið ov lítil og skipasambandið var soleiðis hattað, at tað bar ikki altíð til at tryggja sær, at tú kundi fáa eykalutir eftir stuttari fráboðan. Hetta áttu bæði operatørurin og tænastufyritøkurnar at havt fyrireikað seg betur uppá.

Tað hevði eisini verið betri, um operatørurin hevði verið í Føroyum størri part av tíðini, meðan projektið varð lagt til rættis.



*Pauli Einarsson, formaður í FOI og Arne Rosenkrands Larsen frá Dopas. Mynd Jens Kr.*






*Lars Brovold frá Danop og Arne Rosenkrands Larsen frá Dopas væl nøgdir eftir eftirmetingarfundið um Lopransboringina saman við umboðum fyri føroyskt vinnulív. Mynd Jens Kr. Vang*

### Føroyska luttøkan stór

Á fundinum varð m.a. spurt um føroyingar kunnu vænta sær meiri arbeiði í sambandi við framtíðar kanningar og leiting. Til tað svaraðu umboð fyri Danop, at ein neyvan skal rokna við, at føroyska luttøkan í fráландavirksemi verður upp til 25%, men um veruligt gongd kemur á leitingina og ikki minst um talan verður um fund, so fara føroyingar sjálvandi at merkja nógv meira til hetta virksemi, ikki minst tá hugsað verður um, hvussu lítil føroyski arbeiðsmarknaðurin er.

Ein partur av teimum fólkum, sum vórðu lærd upp í sambandi við boringina í Lopra kunnu lættliga fáa arbeiði á øðrum boripallum varð eisini sagt á fundinum.

### Ros frá Maersk

Á fundinum vóru eisini umboð fyri Maersk Contractors. Stjórin Jens Smith rósti føroysku borifólkunum. Borifólkini hjá Maersk vóru fegin, at føroyingar stóðu við teirra lið í øðrum boriuppgávum kring heimin. Føroyingarnir vóru mettir sum góð arbeiðsmegi og hevur Maersk longu sett ein føroying, sum var við í Lopra, í starv í Norðsjónum.

Pauli Einarsson, formaður í Føroya Oljuídnað er nøgdur við fundin. Hann vísir á, at Lopransboringin hevur prógvað, at føroyskar fyritøkur og arbeiðsmegi eru væl egnað til hesa nýggju uppgávu. Men hetta er eitt nýtt øki og tí er enn nógv eftir at læra.

Projektið hevur víst, at føroyingar megna at halda avtalur. Pauli Einarsson, sum alla tíðina hevur víst á týdningin føroysk luttøka hevur í slíkum arbeiði, sigur, at við Lopransboringini er hesin boðskapur væl og virðiliga komin fram, og hava vit í sambandi við arbeiði í oljuvinnuni eisini lært raðfylgjuna, sum er trygd fyrst, síðani dygd og seinast framleiðsla. Við øðrum orðum er byrjanin fyri eini brúkiligari framleiðslu trygd og dygd.

Pauli Einarsson heldur eisini, at vit hava lært nógv í hesum fyrsta projektinum av hesum slag. Um føroyskar fyritøkur og einstaklingar fáa at vita, hvussu arbeiðið skal gerast, so verður tað eisini gjørt. Tað vísir seg, at fær tú eina defineraða uppgávu, so verður hon gjørd. Júst hetta er av stórum týdningi.

**Skráseting Føroya**
hevur í dag skrásett niðanfyristandandi fráboðan

**Skrásetingar-nr.**
P/f 2268, **P/f Salarbotsa, 370 Miðvágur**

**Viðtøkur broyttar:**
09.07.1996

**Tekningarreglur:**
Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum

**Skráseting Føroya**
tann 21. november 1996

**Kristin Balle**